DAGSINS MEINING

Vit hava øll nakað at læra av svium

Valúrslitið í Svoríki gjørdist sera áhugavert, ikki minst tí tað ger upp við tað rák, sum hevur verið galdandi í mongum londum, har teir borgarligu flokkarnir í eitt nú Danmark, Noregi og Týskalandi hava gingið nógv fram, tó at tað tykist at venda aftur í Týskalandi. Í Svoríki hava teir borgarligu ikki fingið eitt bein til jørðina. Hetta er sera áhugavert nettupp nú. Valið hevur staðið um ideologisk sjónarmið og skilnaðir. Øðrumegin hava teir borgarligu staðið við kravinum um skattalætta tvs. við krøvum um, at man í ávísan mun skuldi avmontera vælferðarstatin við privatisering av stórum almennum fyritøkum, loysa pensiónsspurningin við privatum pensiónsskipanum osfr. Hinvegin hevur Javnaðarflokkurin staðið við einum sera einføldum boðskapi um, at vælferðarstaturin er góður. Hann skal ikki avviklast ella gerast veikari. Hann skal tvørturímóti gerast sterkari. Nettupp í eini tíð vit liva í sum nú, har fólk eru hart kroyst á arbeiðsmarknaðinum, fólk slítast skjótt, og hvar høgrarákið er sterkt í heiminum, hava javnaðarfólkini so sagt, at tað er altumráðandi at styrkja vælferðarstatin.

Teir fóru á val við einum heilt greiðum boðskapi um at styrkja tað tradionella fundamentið undir vælferðarstatinum: betri pensiónsskipanir, betri útbúgvingartilboð til børn og ung, betri sjúkrahústilboð, betri viðgerðartilboð, ansingarpláss og røktarheimspláss. Tvs. tey siðbundnu virðini undir vælferðarstatinum. Tað kann virka eitt sindur vanabundið og fantasileyst. Men Javnaðarflokkurin hevur vitað, at hetta var tað besta fyri tað svenska fólkið, og teir hava vitað, at varð farið undir at niðurbyggja vælferðarstatin fóru at ganga ártíggju at venda rákinum aftur. Tað svenska fólkið, sum væl at merkja, livir í heimsins besta og tryggasta samfelag, hevur tikið boðskapin til sín og tað hevur sagt klárt nei til at tað verður pilkað við vælferðarstatin. Og eitt klárt ja til at styrkja hann.

Áhugavert er eisini at síggja, at tað fremmandahatur, sum borgarligu flokkarnir um alt Europa spæla uppá, hevur als ikki borið ávøkst í Svoríki. Javnaðarflokkurin, vinstraflokkarnir og tann liberali fólkaflokkurin (sum einki hevur við okkara fólkaflokk at gera) hava klárt meldað út, at teir vilja ikki hava fremmandahatur og rasismu. Svoríki skal vera eitt land, har fólk kunnu søkja til, tá tey verða forfylgd fyri sínar áskoðanir. Eftir svenska valúrslitið bíða øll nú eftir tí týska valinum.

Vit í Føroyum kunnu annars bara harmast um, at tann flokkur, sum eins og svenski Javnaðarflokkurin vil verja vælferðarstatin, ikki í løtuni tykist at hava møguleika at gera sína ávirkan galdandi. Í løtuni verður rikin ein knallhardar liberalistiskur borgarligur politikkur. Føroyingar eins væl og nógvar aðrar tjóðir hava so sanniliga nógv at læra av tí svenska modellinum og rákinum har, sum so týðuliga og klárt byggir mangarð um vælferðarstatin.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Siðsemisnevndin

Haldur S. Johansen

Fólk flest undrast, nú Bill Justinussen, landsstýrismaður, hevur valt nýggjar limir í vísindaligu siðsemisnevndina. Undranin snýr seg serstakliga um, at teir valdu limirnir koma úr smáum trúarbólkum, ið bert umboða nøkur fá prosent av trúarlívinum í Føroyum. Sjálvur undrist eg, men ikki av hesi orsøk. Eg undrist, at eingin setir spurnartekin við, hví siðsemisnevndin partú skal mannast við fólki, ið er knýtt at onkrari samkomu ella kirkju. Hví er tað so, at tá ið tosað verður um siðsemi, so verður hildið, at fólk sum fáast við religión, eru tey røttu fólkini at svara spurningum um siðsemi?

Orsøkin er valla, at tey hava víst seg at vera betri ella klókari enn vit onnur. Orsøkin er helst tann, at nógv fólk halda, og ikki bara úr Miðflokkinum, at siðsemi bert kann skiljast í sambandi við religión. So av tí at prestar, predikantar og trúgvandi yvirhøvur eru talsmenn fyri religión, verður hildið, at tey eisini eru talsmenn fyri siðsemi. Veruleikin er tó tann, at siðsemi er sjálvstýrandi. Hon er ikki tengd at religiónini.

Teoriin um náttúrliga lóg (en: The Theory of Natural Law) hevur verið tann ráðandi teoriin um siðsemi í søguni hjá kristindóminum. Hon sigur, at tað besta, ið kann gerast undir øllum umstøðum, er at halda seg til tað, sum hevur tær bestu orsøkirnar á sínari síðu. Soleiðis eru tann trúgvandi og tann ikki trúgvandi í somu støðu, tá ið tað kemur til at gera metingar um siðsemi. Báðir partar eru útgjørdir við samvitsku og orsøkum. Fyri báðar partar er neyðugt at lurta eftir orsøkum, og at vera trúgvur ímóti samvitskuni, fyri at gera eina ábyrgdarfulla meting um siðsemi.

Prátið um at manna siðsemisnevndina við fólki úr samkomum og úr kirkjuni, gerst eisini eitt sindur tápuligt, tá ið hugsað verður um, at talan er um eina vísindasiðsemisnevnd. Í øldir hevur verið góðtikið, at vísindin er sjálvstýrandi. Hon hevur sínar egnu spurningar, sín egna hátt at svara teimum uppá, og sín egna standard fyri sannleikanum. Í strembanini hjá granskaranum at finna sannleikan um heimin, hevur tann kristni myndugleikin einki at týða. Tað var sjálvandi einaferð, at kirkjuligur myndugleiki ognaði sær rættin til at døma vísindina í navni trúarinnar: granskingin hjá Galileo var fordømd, og hann var noyddur at havna henni, tí hon var ósambærulig við kristnu trúnna, sum hon var fatað tá. Nú hava flest øll kristin lært, at trúgv ikki gevur innlit í vísindalig evnir.

Í hjarta mínum býr frælsi - MEN!

Nemus Nap Djurhuus

Nú er tann stundin komin til handa, har Miðflokkurin fær at vita, hvar skápið skal standa.

Tað letur seg ikki gera í ár 2002 at føra svartasta fundamentalistiskan kristnan afturhaldspolitikk.

So um Miðflokkurin ikki vil føra realpolitkk, ja so er eitt at gera – slít samgonguna.

Eg vil heldur liva undir svartasta sambandi heldur enn at liva kúgaður undir kristnum fundamentalistum.

Svartasta sambandinum vinna vit á, tá vit fáa eina sterka sjálvstýris samgongu – MEN móti kristnu fundamentalistunum, hava vit ikki ein livandi møguleika at fóta okkum aftur!

Íslendsk Úlpa til Føroya at spæla

Íslendski bólkurin Úlpa fer at spæla á konsertum í Gøtu og í Havn. Saman við teimum fara føroyskir bólkar eisini at spæla

TÓNLEIKUR
Tíðindaskriv

Í komandi viku kemur íslendski rockbólkurin Úlpa til Føroya.

Leygarkvøldið 21. september fer bólkurin at spæla í Losjuni í Gøtu saman við føroyska bólkinum Krit.

Sunnukvøldið 22. september verður konsert í Útvarpshøllini í Havn, har eisini Krit; MC Hár, Gestir og Flux fara at spæla.

Ferðin hjá Úlpa er komin í lag í sambandi við 25 ára føðingardagin hjá Plátufelagnum Tutl. Seinni í ár skal íslendski bólkurin til Danmarkar og USA at spæla. Tónleikurin, sum teir spæla, kann samanberast við nøvn sum Radiohead, Sigur Rós, Muse, Coldplay og Aha. Ein av sangunum hjá Úlpa roynir seg í hesum døgum sum eykalag á 15 teimum bestu.

Hóast úlpa merkir tað sama á íslendskum sum á føroyskum, hevur bólkurin tó fingið navn frá russiskum tekniseriufiguri.

Tað er Plátufelagið Tutl, sum saman við Tónleikasamtakinum Grót, skipar fyri konsertunum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari: Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Kunnu vit kunna ?

Helgi Abrahamsen

Ein afturvendandi setningur, sum mangan var at hoyra í sambandi við fullveldistilgongdina í farna valskeiði, var setningurin »øll kunning er góð«. Fólkið skuldi kunnast um ætlanirnar hjá landsstýrinum, og tað skuldu millum annað óheftir embætismenn syrgja fyri.

Vit fingu Hvítubók, Caragata álitið, tey sonevndu »Íslendsku tølini«, eina heimasíðu við kunnandi tilfari og ein alment figgjaðan faldara frá samgonguflokkunum fingu vit eisini inn um hurðina. Men spurningurin sum altið reisir seg er, hvussu óheft er tílík kunning.

Sannleikin í fleiri útgávum

Eg hoyrdi einaferð dømið um eitt fólkatingsval, har Sosialdemokratiski flokkurin hevði stóra framgongd. Nakað eftir valið varð ein veljarakanning gjørd, sum vísti, at Sosialdemokratarnir hildu støðuna. Tveir tíðindamenn skrivaðu hvør sína grein um veljarakanningina, har annar brúkti yvirskriftina »Sigurin er staðfestur«, meðan hin skrivaði »Framgongdin er steðgað«.

Hetta var kunningin, sum hesir báðir tíðindamenninir góvu sínum lesarum. Báðir skrivaðu teir um sama evni, og hvørgin skrivaði ósatt, men kortini fingu teir tvær søgur, sum ikki kundu samanberast.

Íslendsku tølini vóru fínpussaði

Tá ið eg taki hetta evnið upp, so er tað tí at eg fyri fáum vikum síðani var inni á heimasíðuni hjá landsstýrinum um fullveldi, fyri at leita eftir »Íslendsku tølunum« (um langtíðarárin av at ríkisveitingin fellur burtur). Eg fann tað, sum eg leitaði eftir, og printaði tað út.

Á veg inn á Skálafjørðin við Gomlu Ternu setti eg meg at lesa í tilfarinum. Tá sá eg, at rættingar vóru gjørdar í tekstinum á tann hátt, at upprunatekstur var yvirstrikaður, men kundi tó framvegis lesast, meðan nýggjur tekstur var settur ístaðin.

Hví hetta var lagt soleiðis út á heimasíðuna, veit eg ikki, men helst er talan um ein tekniskan feil, tí rættingarnar sóust ikki á teldusk ýggjanum, men bert á tí útprintaða tilfarinum.

Millum rættingarnar í tekstinum kunnu nevnast hesar yvirskriftirnar:

- »Vøkstur í skattatrýstinum« var broytt til »Skattatrýst«
- »Arbeiða meira – vælferðin minni« var broytt til »Arbeiði og vælferð«

Um vit lesa innihaldið í tekstinum, so síggja vit skjótt, at yvirskriftirnar »Vøkstur í skattatrýstinum« og »Arbeiða meira - vælferðin minni« passa útmerkað til niðurstøðurnar í tilfarinum, so tað er ikki tí, at yvirskriftirnar eru broyttar. Nei heldur man talan vera um eina roynd at siga tingini við teimum røttu orðunum, soleiðis at kunningin passaði til ætlan landsstýrisins.

Politisk upplýsing

Tá fólkaatkvøða skuldi verða um fullveldisspurningin í mai 2001, hevði landsstýrið eitt lógaruppskot klárt, sum millum annað segði, hvussu peningur til politiska upplýsing í sambandi við fólkaatkvøðuna skuldi býtast ímillum flokkar og felagsskapir. Eftir tí uppskotinum skuldi meira stuðul latast til »jasíðuna« enn til »neisíðuna«.

Vit kunnu tí spyrja, hví fullveldisfólk skuldu kunnast meira enn sambandsfólk? Mær vitandi er eingin munur á, hvør av hesum pørtunum er tornæmari enn hin.

Jú víst eru føroyingar kunnaðir, og øll kunning er góð. Eitt samfelag og ein politisk skipan eiga altið at tola, at fólkið fær innlit í samfelagslig- og politisk viðurskifti. Men spurningurin er, um vit nakrantíð í hesum landi fara at kunna kunna objektivt. – Tað kláraði landsstýrið í hvussu so er ikki í sambandi við fullveldisætlanina.

Kirkjan ella fólkakirkjan

Nicolina Jensen Beder

So lagt eru vit nú komin í Føroyum, at neyðugt er at seta navn á egnu kirkju okkara. Í uppvøkstri mínum var kirkjan, kirkjan rætt og slætt. Í Havn høvdu teir Katolikkakirkjuna, ið var nevnd við navni. Kirkjan, skúlin og heimið gingu hond í hond.

Í kirkju fóru vit hvønn sunnudag, óansæð um tað var prestur ella deknur. Tó vil eg siga, at tað var eyka hátíðarligt, tá ið prestur var. Tá vóru ljósini tendraði, fólk fóru til altars, og børn vóru borin til dópin. Um kvøldið fóru vit á møti, tá hevði hvør maður loyvið at gera orðið fram. Hetta var kallað at vitna. Hugnaligt at minnast aftur á. Málburðurin var frá teirra egna umhvørvi og bar tað meira enn so til at hoyra á vitnisburðinum, hvat maðurin tókst við í gerandidegnum. Líknilsini vóru tikin út teirra egna umhvørvi. Tá var ikki tvístøða millum kirkju og missiónshús, langt minni ímillum prest og degn. So kom næsta ættarlið, málburðurin broyttist og flestu fingu betri málsliga útbúgving. Nú bar ikki til longur. Tá byrjaði sundurlyndið, har hvør vildi ráða sær. Nú er sundurlyndið vorðið uppaftur størri, og hvør trúarbólkur vil hava somu rættindi, sum kirkjan eina hevði. Hetta minnir um søguna, ið Kåre Holt, norskur rithøvundur, sigur frá, um normenn, ið fluttu til Amerika. Teir søgdu seg flyta undan kirkjuni. Alt var sera gott at byrja við, men so gjørdi sundurlyndið seg aftur galdandi og teir spjaddust í allar ættir, hvør við sínum trúarbólki.

Kirkjan hevur havt ómetaliga nógv at týða í Føroyum, og eg eri onga løtu í iva um, at vit vóru betur farin uttan alt hetta sundurlyndi.

Um vit nú hyggja eftir, hvørja uppgávu fólkakirkjan í roynd og veru hevur, kunnu vit í fyrstu syftu taka hana sum ein ser vælvirkandi stovn. Prestarnir, ið starvast hvør í sínum prestaøki, hava fingið holla útbúgving í gudfrøði eins og í bókføring. Teir verða løntir eins og einhvør annar embætismaður. Starv teirra krevur, at teir eru tøkur til eina og hvørja tíð.

Hvørt einasta mansbarn, borðið í heim í Føroyum, verður skrásett. Hvørt barm við navni, óansæð um tey verða doypt ella navngivin, øll standa tey í kirkjubókini. Óteljandi váttanir skulu skrivast bæði til eitt og annað endamál. Í kirkjubókini verða øll skrásett, bæði konfirmantar, kirkjuvígd og annars hvørt eitt deyðsfall.

Hugsað sær til virðið í kirkjubókunum. Kirkjubøkurnar eru høvuðskeldurnar til ættargransking, eins og tær hava stóran týdning fyri siðsøgulig og onnur vísindi. Í Eysturoy er kirkjubók heilt aftur til 1687.

Umframt bókføringina hava prestarnir aðrar fastar reglur at ganga eftir í tí kirkjuliga arbeiðinum. Sum andaligir vegleiðarar hava teir bundnar uppgáva við tað, at prædikutekturin er givin frammanundan. Prædikan skal vera vel fyrireika. Eisini hon er bundin uppgáva við tað, at prædikutekturin er givin frammanundan. Prædikan skal vera vel fyrireika út frá teksinum, so hon kann geva fólki nakað at hugað um. Annað, sum fer fram í kirkjuni, er altargongd, dópur, konfirmatión, brúðarvíglsa og jarðarferð. Orð biskups, H. J. J.: »Gudstænastan skal ikki kappast við undirhald av øðrum slag. Gudstænastan skal vera hátíðarlig og geva fólki eina friðsæla løtu, so tey kunnu fara rikari heim«.

Umframt prestarnir, ið fáa løn fyri fast arbeiði, hevur kirkjan átt ein trúgvan skara av óløntum kirkjutænarum. Terra ósøknað arbeiði hevur gjørt, at kirkjurnar í Føroyum kunnu hava havt kirkjutænastu, sjálvt um prestur ikki var til staðar. Av og á verður spurt, um tað er neyðugt at hava eina fólkakirkju, jú, har til vil eg svara, at ongantíð í Føroya søgu hevur tað verið meira neyðugt. Kirkjan er einasta friðarstað í øllum hesum meldrinum av átrúnaligum rørslum.

Nú ið kjakast hevur verið um yvirtøku av kirkjuni, og um hvør ið gjalda skal, hava nógvar røddir verið frammi, og í yvirvág av teimum, ið vilja mága støðið undir kirkjuni. Kirkjuskattur og trúarfrælsi verður blandað saman í eitt ósømiligt kjak.

Kirkjan og kirkjuskattur

Aftaná at hava fingið innlit í kirkjuligt arbeiði, undrar tað meg, at nakar kann vera frítikin fyri at gjalda kirkjuskatt. Kirkjan røkir bæði eitt andaligt og eitt verðsligt øki, ið henni er álagt. Tað verðsliga er at føra kirkjubøkurnar, umsita navnalóggávuna, samskifta við myndugleikarnar um barnsburð og deyða, og fyri ikki at tosa um tað ótal av attestum, ið fólk skulu hava í tíð og ótíð. Neyvan ber til, at vera frítikin fyri at gjalda sjúkrakassan, vegna flyting í annað trúarfelag.

Nakað annað, ið tykist at vera eitt sindur løgi er, at hesi fólk, ið mest hava hug at mótmæla, eru fólk, ið tulka orð úr halgu bók til eitt hvørt høvi. Í Halgibók fáa vit greitt svar, ikki frá einum og hvørjum, men frá Jesusi sjálvum, tá ið hann sigur: »Gevið tá keisaranum tað, ið keisarans er, og Guði tað, ið Guds er«. (Mt. 22,21). Eg haldi, at tað verðsliga arbeiði hjá kirkjuni neyvan kann tulkast øðrvísi, enn at vera keisarans. Tá ið skrivað verður niðursetandi um kirkjubóksførsluna og tvætli um, at tað skal vera mannminkandi at lata seg skráseta hjá presti, verið eg bæði kedd og hørm. Tað munnu vera nógv lond, ið misunna okkum, at vit eiga ein so dýran siðsøguligan skatt. At møguleiki er fyri at hetta kann gerast øðrvísi, er eingin trygd fyri, at tað kann gerast bíligari og betri.

Hví er so umráðandi at yvirtaka kirkjuna, áðrenn nakað er avklárað? Vit eru mong, ið gerast ørkymlaði, tá ið skrivað verður: Vit yvirtaka, so skulu vit ráða, ella um grundlógina: at føroyingar ongantíð have ynskt hana. Hvørji eru vit? ella hvørji eru føroyingar? og Hvørji eru tey, ið tala okkara alra vegna. Hóast eg alla mína tíð havi vakt sjálvstýrið, eri eg komin til tað løgnu niðurstøðu, at sambandsfólk vísa seg at hava meira kenslu og góðsku fyri øllum tí, ið føroyskt er, enn øll hesi í rópa um loysing.

Hægsta ynski mítt er, at føroyska kirkjan og føroysku kirkjusiðirnir verða óbroyttir, at kirkjan framvegis fær góð og trygg kor.

Tórsnavn, 12. sept. 2002